# Svínoyingar tosa við Klaksvík um samstarv

**Mándagin fundaðust umboð fyri Klaksvíkar kommunu við bygdaráðið í Svínoy um møguligt samstarv frameftir. Borgarstjórin í Klaksvík sær nógvar møguleikar í Svínoynni, um oyggin bara fær møguleikar at menna seg. Verður ikki okkurt gjørt, fer støðan í oynni at versna**



*Umboð fyri Svínoyar og Klaksvíkar kommunu hittust í Svínoy mánadagin. Frá vinstru: Jógvan Olsen, kommunustýrislimur í Svínoy, Jógvan Edmund á Geilini, kommunustýrislimur í Svínoy, Eyðun Jacobsen, borgarstjóri í Svínoy, Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, Jákup Mikkelsen, býráðslimur í Klaksvík, og Torleif Sigurðsson, býráðslimur í Klaksvík*

KOMMUNUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mánadagin vitjaðu trý umboð fyri Klaksvíkar kommunu í Svínoynni, har fundur var um møguligt samstarv millum Klaksvík og Svínoy.

– Talan er ikki um nakrar beinleiðis samráðingar, men var hetta ein fundur, har umboð fyri kommunustýrini bæði kunnaðu hvønn annan um viðurskiftini, stóð at lesa í einum tíðindaskrivi, sum Steinbjørn O, Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, og Eyðun Jacobsen, borgarstjóri í Svínoy, sendu út týsdagin.

Umframt samstarv um ítøkilig øki, vóru fyrimunir og vansar við eini møguligari samanlegging eisini umrøddir.

– Eftir ein góðan og gevandi fund eru partarnir samdir um hvør í sínum lagi at umhugsa og lýsa møguleikarnar, og - tá báðir partar eru tilreiðar til tess - at hittast aftur á einum seinni fundi, skrivaðu borgarstjórarnir í tíðindaskrivinum.

### Ferðsambandið avgerandi

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, heldur, at tað liggja ótømandi møguleikar í Svínoynni, um oyggin bara fær møguleikan at menna seg.

– Ongastaðni í Norðoyggjum er so nógv og gott slættlendi, sum tað er í Svínoy, og har kann mann bara ímynda sær, hvat kundi verið gjørt, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

Og tá ið tosað verður um at menna oynna, eru teir báðir borgarstjórarnir á einum máli um, at ferðasambandið spælir ein avgerandi leiklut.

– Vit eru púra samdir um, at skal oynni verða lív lagað, so má farleiðin millum Svínoy og restina av landinum bøtast munandi, soleiðis at bæði akfør og fólk lættliga og fleiri ferðir dagliga kunnu ferðast til og frá oynni.

Umboðini fyri Klaksvíkar kommunu lovaðu at virka fyri, at ferðasambandið til Svínoyar verður betrað.

### Vilja hava tunnil

Kommunustýrið í Svínoy hevur ta greiðu støðu, at rætta loysnin fyri oynna er ein tunnil frá bygdini yvir í havnina, har ein ferjulega eigur at verða gjørd. Haðani er siglingartíðin inn til Hvannasunds umleið 15 minuttir.

Ein slík farleið hevði gjørt tað møguligt hjá svínoyingum og øðrum verða búgvandi í Svínoy og hava arbeiði inn á meginøkinum, og tað sama tann øvugta vegin.

– Tað má gerast púra greitt fyri landsmyndugleikunum og øllum Føroya fólki, at verður arbeiðið upp á hesa farleið ikki byrjað sum skjótast, so hon kann takast í brúk um heilt fá ár, so fer støðan í Svínoy bara at versna, siga borgarstjórarnir í tíðindaskrivinum.

– Undirritaðu kommunur eru tí á fundi í dag komnar ásamt um í felag at heita staðiliga á landsins myndugleikar um beinanvegin at seta í verk tær neyðugu forkanningarnar og fyrireikingarnar og at seta tann neyðuga peningin av á komandi løgtingsfíggjarlógum.

# Samstarva um barnavernd

**Ongar ætlanir eru um fleiri kommunusamanleggingar í Norðoyggjum, men kommunurnar eru áhugaðar í at samstarva á onkrum ávísum øki**

SAMANLEGGINGAR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eftir at Klaksvíkar kommuna og Mikladals kommuna fyri sløkum tveimum árum síðani løgdu saman í eina kommunu, hava tað ikki verið ítøkiligar samráðingar við aðrar kommunur í Norðoyggjum um at koma upp í samstarvið.

– Prátið við svínoyingar snýr seg í fyrstu syftu ikki um samanlegging, men heldur um samstarv á onkrum ítøkiligum øki, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu.

Hann sigur, at tað eru ongar ítøkiligar ætlanir um fleiri kommunusamanleggingar í Norðoyggjum.

### Barnaverndin

Umframt Klaksvíkar kommunur, eru seks aðar smærri kommunur í Norðoyggjum.

Hesar kommunur arbeiða í løtuni við møguligum samstarvi á barnaverndarøkinum.

– Vit hava boðið hinum kommunum í Norðoyggjum til samstarv á hesum øki. Vit hava eina vælvirkandi og fakliga sterka sosiala deild í Klaksvíkar kommunu, og tí er tað upplagt, at vit samstarva í øllum Norðoyggjum um barnaverndina, heldur Steinbjørn O. Jacobsen.

Fundur verður millum kommunurnar um hetta mál tann 12. september.

### Mótvekt til Havnina

Klaksvíkar kommunu hevur í hesum árinum eisini lagt upp til samstarv tvørtur um Leirvíksfjørð, nú Norðoyatunnilin verður veruleiki um eitt lítið ár.

Samband hevur verið millum Klaksvíkar kommunu og kommunurnar í Leirvík, Fuglafirði og Gøtu, men hetta mál er onga veg komið enn.

– Skulu vit hava eitt kraftsentur sum mótvekt ímóti Havnini, so er tað í hesum økinum, at tað skal vera, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

Hann heldur, at Klaksvík og kommunurnar í Eysturoynni væl kunnu samstarva um ávís øki.

## Koyrdi ólógliga ígjøgnum tunnilin

Ein framligur motorsúkkluførari varð sunnukvøldið tikin av løgregluni, tí hann hevði koyrt ígjøgnum Norðoyatunnilin.

Motorsúkklan fór strúkandi ígjøgnum tunnilin um ellivu-tíðina, og maðurin varð alt fyri eitt meldaður til løgregluna í Klaksvík. Løtu seinni varð maðurin tikin.

– Tað er beinleiðis lívshættisligt at koyra ígjøgnum tunnilin við bensinmotori. Tað er soleiðis, at tað eru lummar av luft inni í tunnlinum, sum bilar við bensinmotori kunnu festa í. Tað er als ikki loyvt at koyra gjøgnum tunnilin, og tey, sum bróta forboðið, vera meldað til løgregluna, veit Norðlýsið at siga av politistøðini í Klaksvík.

**ek**

## Meira útvarp úr Atlantis

Leygarkvøldið klokkan sjey verður tann fyrsta av fýra beinleiðis útvarpssendingum úr mentanarhúsinum Atlantis í Klaksvík.

Hesar sendingar vóru eisini á skránni hjá Útvarpi Føroya í fjør, og tær eydnaðust sera væl. Nú verður eitt nýtt umfar av sendingum, og aftur hesaferð er tað Gunnar Nolsøe, sum skipar fyri.

Í fyrstu sendingini fer hann millum annað at práta við Niklas Hera Jákupsson um ymiskt.

Livandi tónleikur verður eisini í sendingini, og húsaorkestrið er mannað við Magna Husgaard, Eyðuni Nolsøe, Mikkjali Hvannastein og Jens Paula Joensen. Leygarkvøldið verður Nicolina Rubeksen solistur hjá teimum.

Fólk kunnu eisini sleppa inn at hyggja og lurta, og atgongumerki kunnu keypast á Shellstøðini í Klaksvík.

**ek**

## Viðgera oljuavgjaldið

Í dag verður løgtingsfundur, har uppskotið um at broyta oljuavgjaldið kemur til fyrstu viðgerð. Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Miðflokkurin hevur lagt uppskotið fram, men vit nevndu ikki, at tað hevur flokkurin gjørt saman við Sjálvstýrisflokkinum. Teir báðir smáu andstøðuflokkarnir standa tí í felag aftan fyri uppskotið.

**ek**